TILMÆLI

til

Fiskimálaráðið

frá

Metingarnevndini viðvíkjandi Menningarkvotum av makreli, norðhavssild og svartkjafti

**Grundarlagið fyri arbeiðinum**

Við heimild í "Kunngerð um menningarkvotur av makreli, norðhavssild og svartkjafti til menningarætlanir í ávísum økjum 2018", setti landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum hesa nevnd at viðgera og gera tilmæli um útlutan av menningarkvotum: Gestur Hovgaard (formaður), Arnbjørn Egholm og Guðrið Andorsdóttir. Sum varalimir vórðu vald Ásmundur Guðjónsson, Rúna Hjelm og Bartal Dulavík. Barbara á Tjaldrafløtti hevur virkað sum skrivari hjá nevndini.

Nevndin varð formliga sett fríggjadagin tann 8. juni, tá fundur var við Fiskimálaráðið. Á hesum fundi varð kunngerðin gjøgnumgingin og formligu viðurskiftini avgreidd. Greitt var á fundinum, at nevndin ikki skuldi meta um, hvørt umsøkjarar uppfylla treytirnar í §11, §11 stk. 2 og §11 stk. 3 í kunngerðini.

Nevndin hevði fyrsta formliga fundin sama dag, og avráddi m.a., at eykalimirnir skuldu takast við í viðgerðina, hetta fyri at skunda undir arbeiðið sum heild, og fyri at hava eitt meiri dygdargott og breiðari grundarlag at meta umsóknirnar út frá.

Samanlagt hevur nevndin móttikið og viðgjørt 40 umsóknir, hetta frá 38 umsøkjarum, tvs. at tveir umsøkjarar lótu inn tvær umsóknir. Onkur umsókn hevur eisini fevnt um fleiri verkætlanir í somu umsókn. Umsóknirnar umfata øll øki í landinum, og fleiri umsóknir eru úr hvørjum øki. Eisini eru fleiri umsóknir frá aktørum, har verkætlanin umfatar fleiri øki.

Tøka nøgdin til útlutan í 2018 er 41.912 tons av svartkjafti, 8.749 tons av makreli og 7.510 tons av norðhavssild. Samanlagt er søkt um munandi størri nøgdir, enn nøgdin, sum er tøk, og áhugin frá umsøkjarum er lutfalsliga størri at fáa tillutað makrel og sild í mun til svartkjaft. Í yvirlitinum í talvu 1 niðanfyri, verða hesi viðurskifti lýst.

**Talva 1**: Yvirlit yvir nøgdir at ráða yvir, tonsatal søkt er um og munurin ímillum hesi.

| Fiskaslag | Tonsatal at ráða yvir | Tonsatal søkt er um (avrundað) | Munur í tonsatali | At ráða yvir í % av søktum |
|---|---|---|---|---|
| Svartkjaftur | 41.912 | 289.000 | 247.088 | 14,5 % |
| Makrelur | 8.749 | 87.000 | 78.251 | 10,1 % |
| Norðhavssild | 7.510 | 67.500 | 59.990 | 11,0 % |

**Tilmæli**

Av teimum íalt 40 umsóknunum, mælir nevndin til at 9 umsóknir fáa tillutað menningarkvotu. Hesir umsøkjarar, økini virksemið umfatar, nøgdir fyri 2018 og áramál verður lýst í talvu 2 niðanfyri.

| **TALVA 2:** tilmælt menningarkvotu, øki, tons 2018 og áramál | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Umsøkjari** | **Øki** | **Svart-kjaftur Tons** | **Makrel Tons** | **Sild Tons** | **Áramál** |
| Vestmanna Seafood | Norðstreym | 16.212 | 2.224 | 1.770 | 4 |
| P/F Skip / Snarfrost | Vágar | 13.000 | 2.224 | 1.770 | 4 |
| Sp/f Sjógæti | Norðeysturoy / Norðstreym | 0 | 1.000 | 600 | 4 |
| Rock Trawldoors | Suðuroy | 1.700 | 0 | 0 | 2 |
| Vørðustíggjur | Sandoy | 0 | 1.301 | 1.000 | 1 |
| Delta Seafood | Suðuroy | 0 | 1.000 | 970 | 1 |
| P/F Jókin | Suðuroy | 11.000 | 0 | 0 | 1 |
| Kósin Seafood & Næraberg | Norðoyggjar / Suðuroy | 0 | 0 | 400 | 1 |
| Steintór & TG Fish | Suðuroy | 0 | 1.000 | 1.000 | 1 |
| Samanlagt tons: | | 41.912 | 8.749 | 7.510 | |

Tær umsóknir sum verða tillutaðar 4 ára kvotu verða tilmæltar eina ávísa minking av tillutan av kvotu fyri fylgjandi árini.

Mælt verður til at útluta Vestmanna Seafood kvotu, tí talan er um eitt greitt nýhugsandi hugskot við framleiðslu av makrel og sild, umframt ítøkiligt uppskot til stigvísa menning av framleiðslu av svartkjafti til matna. Talan er eisini um eitt øki, har aktørarnir hava avmarkaða atgongd til sjófeingi og eina verkætlan, sum vil geva munandi virðisøking, førleikamenning og fleiri og støðugari arbeiðspláss í økinum, t.e. Norðstreymoy.

P/F Skip (arbeiðsnavn), saman við P/F Snarfrost, eigur at fáa lutað kvotu av fleri nýhugsandi orsøkum. Talan er um at veiða sild og makrel við nót, umframt at nisjuframleiða á landi. Talan er eisini um staðseting í einum øki, har aktørarnir hava rættuliga avmarkaða atgongd til sjófeingi, umframt at verkætlanin við skipi og virki vil geva munandi virðisøking, førleikamenning og fleiri og støðugari arbeiðspláss í økinum, t.e. Vágoynni.

Sjógæti hevur eina nýhugsandi umsókn um royking av makrel og sild, umframt aðrar góðskaðar framleiðslur. Felagið byggir sína menningarætlan á ítøkiligar royndir og søluarbeiði yvir eitt munandi tíðarskeið. Talan er eisini um strategiskt samstarv við øki 7 (Norðoyggjar), ið verður við til at tryggja neyðugu góðskuna á fiskinum og søluna. Verkætlanin vil skapa munandi virðisøking, førleikamenning og fleiri og støðugari arbeiðspláss í økinum, sum fevnir um Norðstreym og Sundalagið.

Rock Trawldoors hevur í nógv ár arbeitt við at nýmenna trollemmar, og tað er eisini í hesum sambandi, at skotið verður upp at lata kvotu. Felagið hevur søkt um kvotu til at fíggja og skipa royndir við eini nýskapandi verkætlan innan nýggja teknologi. Verkætlanin kann stuðla undir støðugari og framkomin arbeiðspláss innan handverksvinnuna í Suðuroynni.

P/F Kósin Seafood og Næraberg fáa tillutað kvotu til verkætlan til byrjan av framleiðslu av sild til matna í sunnaru helvt av Suðuroynni, hetta í samstarvi við aktør í økinum. Ætlanin vil vera við til at seta framleiðslu í gongd í einum øki, har aktørar frammanundan hava lítla atgongd til sjófeingi, og tí stendur økisatlitið eisini sterkt.

P/F Steintór og P/F TG Fish hava ætlanir um at veiða sild og makrel til virkingar í Hvalba. Ætlanin byggir á tøkniliga menning av sínum virksemi á sjógvi og landi, har økisatlitið eisini stendur sterkt.

P/F Jókin fær tilluta kvotu av svartkjafti, ið kann vera við til at styrkja tøkniligu menningina í felagnum, harundir virkinum í Hvalba. Økisatlitið stendur eisini sterkt í hesi ætlanini.

P/F Vørðustíggur, ið eigur trolaran Eysturbúgvin, hevur ítøkiligar ætlanir um at fáa gongd á virksemi á landi í Sandoynni, hetta til framleiðslu av sild og makrel. Eysturbúgvin er í samstarvi við partnara í øki 4 (Norðstreym), ið vil styrkja grundarlagið fyri rakstri og menning. Verkætlanin kann geva munandi virðisøking, umframt fleri og støðugari arbeiðspláss á landi í Sandoynni, eitt øki sum í serligan mun uppfyllir økisrættaðu treytirnar.

Delta Seafood hevur drúgvar royndir innan botnfiskavinnuna, serliga við saltfiskaframleiðslu. Felagið hevur eisini framt ítøkiligar royndir at framleiða vørur úr sild og makrel. Ætlanin byggir á samstarv við aðrar aktørar í økinum. Verkætlanin kann greitt vera við til at skapa nýggj og støðugari arbeiðspláss, umframt nýggjar vinnumøguleikar í økinum bygt á lokalt samstarv. Talan er um eina áhugaverda virkisætlan, sum samstundis uppfyllir økisrættaðu treytirnar.

**Arbeiðsleistur**

Nevndin hevur skipað arbeiðið soleiðis, at allir limirnir hava sett seg inn í hvørja einstaka umsókn. Nevndin hevur tilsamans havt 5 formligar nevndarfundir, men hevur javnan hitst á arbeiðsfundum til tess at hava felags viðgerð av umsóknunum. Harumframt eru arbeiðsuppgávur býttar út at loysa millum fundirnar.

Til at meta um ymisku atlitini, hevur nevndin gjørt serstakt metingarblað, sum eisini hevur verið við til at tryggjað, at allir umsøkjarar fáa neyva og javnbjóðis viðgerð. Nevndin hevur eisini í ávísum førum biðið um serkøna hjálp, eitt nú í mun til sølu- og handilsviðurskifti við umheimin og ávís hagtøl.

Fyrsta gjøgnumgongdin av umsóknunum vísti, at nakrar av hesum (6 umsóknir) høvdu meiri brá av at vera ætlanir, leysliga feldar á blað, heldur enn veruligar umsóknir. Tær livdu ikki upp til nakrar av ásetingum í §6 í kunngerðini, og vóru tí ikki tiknar við í eftirfylgjandi viðgerð.

Í eftirfylgjandi viðgerðini hevur hvør einstøk umsókn verið neyvt viðgjørd í mun til ásetingarnar og yvirskipaðu treytirnar í kunngerðini. Hesin parturin av arbeiðinum er farin fram yvir fleiri umfør, har nevndin at enda sat eftir við 14 umsóknum, ið hon helt vera tær dygdarbestu, t.e. í prinsippinum stuðulsverdar.

Tonsatalið hesar 14 umsóknir høvdu søkt um, var eisini nógv størri enn tað tonsatalið, ið til er at taka. Tí var eisini greitt, at raðfesting í mun til m.a. atgongd og onnur økisatlit var neyðug.

Seinasti parturin av arbeiðinum hjá nevndini hevur verið at hugsavnað seg um at meta neyvari kring dygdirnar í hvørjari umsókn sær og at samanbera millum umsóknir. Hetta er eisini gjørt við støði í teimum høvuðsatlitum nevndin hevur havt at fyrihalda seg til í arbeiðinum, og at enda komu vit so fram til tær 9 umsóknirnar, sum vit mæla til fáa játtan.

Nevndin hevur fingið ta fatan, at útlutan av kvotum ikki skuldi smábýtast, soleiðis at skilja, at grundarlagið ikki verður tikið undan einstøkum ætlanum. Nevndin hevur í sínum tilmæli tó skotið upp, í nøkrum førum, at játta minni av kvotu enn søkt hevur verið um. Í einum føri hevur nevndin valt at geva meiri kvotu av einum fiskaslagi, men samstundis minka í øðrum. Hetta hevur givið rúm fyri tilmæli um játtan til fleiri ætlanir, men er samstundis grundað á ítøkiligar metingar í hvørjum føri sær.

Greitt er, at nevndin við ásetingunum um menningarkvotur, er við til at seta gongd á eina nýggja og óroynda skipan. Hetta hevur ført við sær, at tørvur hevur verið á nógvum samskifti í nevndini kring tulkingar, arbeiðshættir og framferð annars, sæð í mun til um talan hevði verið um eina etableraða skipan. Arbeiðið í nevndini hevur gingið væl, har ymisku førleikar okkara hava stuðlað undir eitt gevandi samstarv, og arbeitt er fram eitt greitt og felags forstáilsi av uppgávuni.

**Høvuðsatlitini**

Nevndin hevur sum grundarlag fyri sínum arbeiði kunngerðina um menningarkvotur, serliga §6 og útgreiningarnar í skjali 1 og skjali 2 tilhoyrandi kunngerðina. Í hesum framgongur, at høvuðsatlitini eru økisatlit og virkisætlanin/hugskotið. Knýtt at hesum høvuðsatlitum eru atlit um eitt nú atgongd, virðisøking og burðardygga og samfelagsliga menning.

Skjal 2 býtir landið upp í 7 høvuðsøki, sum metingarnevndin skal grunda sína viðgerð á. Umframt hesi 7 øki, so kann ein ætlan grundast á eitt øki innan eitt høvuðsøki, t.e. um hetta øki er landafrøðiliga avsíðis, hevur vánaligt flutningssamband ella víkir frá í mun til atgongd, broyting í fólkatali ella arbeiðsloysi. Eisini ber til at hava umsóknir, sum byggja á fleiri høvuðsøki ella øki.

Skjal 1 lýsir økisrættaðu atlitini, t.e. støðan í økinum viðvíkjandi atgongd til sjófeingi, arbeiðsloysi og fólkatal í mun til onnur øki. Sum grundarlag undir sínum arbeiði við hesum kriterium, hevur nevndin fingið útvegað hagtalstilfar um atgongd til sjófeingi, um arbeiðsloysi og fólkatal í teimum 7 økjunum í landinum. Hesi tøl vísa, at øll øki uttan øki 6 (Eysturoy) lúka minst eina treyt settar í skjali 1 til kunngerðina. Nevndin valdi tó ikki beinleiðis at sálda umsóknir úr øki 6 frá, men tók tær við, m.a. við atliti til at avsíðis øki í einum størri øki kunnu fáa játtanir.

Greitt er eisini, at nøkur øki uppfylla greiðari enn onnur atlitini til støðulýsingina, t.e. at aktørarnir í hesum økjum hava minni atgongd til sjófeingi enn í øðrum økjum, og at økini kanska eru harðari rakt av arbeiðsloysi enn onnur, ella harðari rakt av minkandi fólkatali. Her er talan um Sandoy og Suðuroy, sum í serligan mun eru rakt av fráflyting, arbeiðsloysi (hóast tað ikki er stórt í løtuni) og atgongd. Serliga í mun til atgongd er talan eisini um Norðstreym, Vágar og - í minni mun - Suðurstreym. Norðoyggjar uppfylla treytina um lítlan fólkavøkstur.

Nevndin hevur ta fatan, at lítil atgongd til sjófeingi, hevur serliga stóran týdning í mun til økisrættaðu atlitini, tí atgongd er ein fortreyt fyri at skapa munagóða menning. Umframt økisatlit skulu virkisrættaði atlit takast, t.e. hvussu nýskapandi ætlanin er, og hvussu stórar inntøkur og virðisøking ætlanin gevur.

Atlitini kring virkisrættaðu og økisrættaðu treytirnar skulu, sambært §6 í kunngerðini, lýsast nærri av umsøkjarunum sjálvum. Tó *kann* nevndin seta seg í samband við umsøkjara, um hon heldur tað vera neyðugt. Nevndin hevur ikki valt at seta seg í samband við umsøkjarar, tí umsóknirnar skulu í prinsippinum bera seg sjálvar.

Skjal 1 í kunngerðini ger eisini greitt, at viðgerðin hjá nevndini *skal* byggja á eina *heildarmeting* av menningarætlanini og verkætlanini. Tá økis- og virkisrættaðu atlitini verða sæð í einari heild, eru tað ásettu atlitini til burðardygga og varandi samfelagsliga menning nevndin hevur hildið seg til at meta

um. Burðardygg og varandi samfelagslig menning fevnir eitt nú um betri teknologi, støðugari arbeiðspláss, førleikamenning, lokalt samstarv og tilknýti, samstarv millum virki og øki, fíggjarligt haldbari, umframt møguligar avleiddar aktivitetir og vinnur.

**Hvussu høvuðsatlitini ganga aftur í viðgerðini.**

Hvør einstøk umsókn er mett út frá einum økisrættaðum og einum virkisrættaðum atliti, umframt eini heildarmeting, soleiðis sum lýst er omanfyri. Harumframt hevur, sum longu nevnt, verið neyðugt at samanbera dygdirnar í bestu umsóknunum og viga hesar í mun til treytirnar í kunngerðini.

Samanumtikið kunnu umsóknirnar býtast í tríggjar bólkar, harav summar umsóknir tó fella inn í fleiri enn tann eina bólkin.

Fyrsti bólkurin av umsóknum handla fyrst og fremst um skip og skiparakstur. Í hesum bólki bóðu fleiri umsøkjarar um somikið stórar kvotur, at rúm hevði bara verið fyri tí eini umsóknini og so einari ella kanska tveimum afturat. Her hevur nevndin yvirskipað havt ta fatan, at tá skuldi talan verið um eina sera nýskapandi og mennandi ætlan, um játtan skuldi verið latin. Í flestu førum hevur nevndin ikki mett hesar ætlanir hava eitt slíkt eyðkenni, eitt nú tí talan er um at virka á sama hátt sum verandi floti, har hesin longu frammanundan hevur stóra veiðiorku. Vit hava í onkrum føri mælt til játtan har skip er umfatað, og byggir tilmælið á, at talan í høvuðsheitinum er um annað slag av veiðu enn tann í dag mest vanliga, at talan er um munandi virðisøking, samstundis sum at økisatlitið eisini stendur sterkt.

Næsti bólkurin av umsóknum hevur ymiskar framleiðslur á landi sum sítt sereyðkenni. Talan er um nógvar ymiskar fiskavørur og framleiðsluhættir. Eisini í hesum føri hevur talan verið um verkætlanir, ið eru rættuliga ymiskar í fyritreytum, stigi av nýskapan og í vavi, t.e. hvussu stórar íløgur og kvotumongdir tær meta eru neyðugar fyri at fáa virkisætlanina at bera til. Eisini innan hendan bólkin eru fleiri ætlanir, har rúm samanlagt einans hevði verið fyri tí eini ætlanini, og so kanska einari ella tveimum afturat. Nevndin hevur her raðfest ætlanir við minni mongdum, men har vit samstundis meta besta góðska og hægst virðisøking fæst burturúr.

Triði bólkurin er ein samansettur bólkur av ætlanum, sum í høvuðsheitinum argumentera fyri teknologiska nýskapan. Nakrar av hesum ætlanum eru sera áhugaverdar, og umfata virksemi bæði á landi og sjógvi. Eyðkent fyri hesar ætlanir hevur tó verið, at tær ikki hava verið so búnar sum verkætlanir, harundir eisini í mun til, at fyrstu kvoturnar longu skulu fiskast nú í heyst. Eina av hesum umsóknum hava vit valt at tilmæla játtan. Her er talan um virki, ið hevur drúgvar royndir við menning av trollemmum, og sum lið í víðari menning av hesum, hevur brúk fyri at gera tøkniligar royndir.

Nevndin hevur verið áløgd, at í minsta lagi 25% av kvotunum skulu latast sum 1 ára kvotur (§4 í kunngerðini). Við uppskotinum til tilmæli vilja ávikavist 34% av svartkjaftinum, 45% av makrelinum og 46% av sildini verða játtaði sum 1 ára kvotur.

Tórshavn tann 17. juli 2018

Metingarnevndin viðvíkjandi Menningarkvotur av makreli, norðhavssild og svartkjafti

Gestur Hovgaard, formaður

Guðrið Andorsdóttir, nevndarlimur

Arnbjørn Egholm, nevndarlimur

Ásmundur Guðjónsson, varalimur

Rúna Hjelm, varalimur

Bartal Dulavík, varalimur